# Fimti ára dagur

# LANDSSJÚKRAHÚS

**23. FEBRUAR 1974**



# Eg minnist

Eg lærdi í 2 ár á Færø Amts Hospitali. Flutti síðani á Dr. Alexandr. hosp., har eg bert arbeiddi einar 14 dagar til eg fór til Danmarkar at supplera. Eg var niðri í 2 ár. Lønin tá var 20 kr. um mánan hjá næm.

Arbeiðsdagurin á Gl. hosp. var frá kl. 7 á morgni til arbeiðið var liðugt, tað var í fyrsta lagi kl. 8 um kvøldið, tá náttarvaktin møtti. Tað kom fyri, at næmingarnir, 3 í tali, fingu frítíma, $1^1/_2$ tíma, men hann mátti nýtast til at heinta medicin á apotekinum í eini tungari kurv. Frídagur var eingin tey 2 árini, so vit sluppu ongan morgun at sova.

Náttarvaktin arbeiddi frá kl. 8 á kvøldi til kl. 12 dagin eftir, tað var tað fyrsta. Kolovnur var á hvørjari stovu, 7 í tali. Móti morgni, tá ið ovnarnir vóru kaldir, var tað eitt tíðandi arbeiði hjá náttarvaktini at bera øskuna oman á sjógv. Tað var ikki bara sum at siga tað. Bara ein spann var til, so tað mátti gangast fleiri ferðir oman á brúnna. Ofta var tað ótespiligt í myrkri og ódnarveðri. Tá man tendraði ljósið inni á skurðstovuni, lýsti tað so frægt, at man sá at ganga oman á brúnna. Eina ferð eg fór oman við øskuni datt eg og keikti fótin, tað førdi við sær, at eg slapp at liggja í seingini einar 8 dagar, so hetta var tað hentasta eg gjørdi í mínari næmingatíð.

Nú kom tann stóri dagur, tá vit skuldu flyta á Dr. Alex. Hosp. Tað mundu vera einir 30 sjúklingar, ið skuldu flytast. Hvussu teir seingjarliggjandi sjúklingarnir skuldu flytast, dugi eg ikki at minnast tíverri.

Tað var bara ovara gongd, sum var liðug og klár at taka í brúk, so har komu allir sjúklingarnir at liggja. Tann fyrsti sjúklingurin var Sofus Arge. Hann bleiv lagdur á stovu 22. Hann var so forliptur, tí har var so fínt, og so vóru ongar rottur, at tá ið hann vaknaði fyrsta morgunin ivaðist hann ikki í, at hann var í himmiríki. Hann lá við foldaðum hondum og bað eftir, at hetta húsið altíð mátti blíva fult, og tann bønin er ivaleyst blivin hoyrd.

Skurðstovan var ikki heilt liðug, so har gingu hondverkarar allan dagin, so tað mátti bíðast til um kvøldið við øllum skurðviðgerum, ið hvussu so er, tá ið tað ikki var akutt.

Hetta er eitt sindur av tí, sum kemur í tankarnar, men nógv man vera gloymt hesi farnu 50 árini. Sjálvt um vit høvdu ein langan og strævnan arbeiðsdag, fingu lítla løn og onga frítíð, so hildu vit okkum slett ikki hava tað so ringt, tí soleiðis átti tað bara at vera.

*Ida Hentze*

Millum teirra, sum fluttu av Færø Amts Hospitalið á Alexandrines Hospital vóru hesi:

Yvirlæknin *Heerup*
Reservalækni *P. Dahl*
*Systir Agnas*, donsk diakonissa
*Systir Soffi*, operatiónssj. úr Bø
*Magdalena Klein*, Strendur, næmingur
*Elisabeth Djurhuus*, Fuglafirði, næmingur
*Ida Magnussen*, Saksun, næmingur
*Josefina Danielsen*, køksgenta
*Inga Højgaard*, Toftir, økonoma



Færø Amts Hospital



Útferð við gl. Reyðakrossi



Dr. Alexandrines Hospital verður reist 28. mars 1923. 23. juni 1921 legði C
grundasteinin; játtaðar vórðu 500.000 kr. til byggingina, men kom D.A
475.000 kr.



D. A. H. og T. B.



D. A. H.



Sjúkrabilur frá kríggstíðini



Skurðstovan á D. A. H.



Systir Ingeborg



D. A. H. Anna Johanson, Pauli Dahl, Anna Haas Michelsen, Vibeke
oft, Jacobina Poulsen.



Matvognar í gomlu kjallaragongini



Køkurin á D. A. H.



Kaffi á rørinum



Mítt fyrsta samband við sjúkrahús kom við ársbyrjan 1952. Nóg væl, at tað ikki kom fyrr, tí bæði mamma og systkin fóru á sjúkrahús og TB tey fátæku 1930-árini, og »pirkan« kom í heilum at vita, um mítt : var vorðið .

Men 30-ára føðingardagin lá eg á sonevndu »lítlu føðistovu« og fekk blóðflutning. Tá kom væl við, at eg øll ungdómsárini hevði verið blóðgevi. Nú fekk eg margfalt aftur, tað ið eg gav, meðan heilsan var.

Umstøðurnar á landssjúkrahúsinum tá vóru trongar men hjartaligar. Sjúkrastovurnar vóru hugnaligar tá sum nú, takkað verið teimum mongu, sum duga at skapa hugnað. Men »uttan-um-rúmini« vóru trong og skirvislig.

Eitt vist stað trongdu vit til skilti eins og á posthúsinum: »Publikum bedes stille op i kø,« tí ikki var meira enn hetta eina staðið á allari niðaru gongd!

Viðgerðarrúm, skurðstova og røntgen vóru kroysur og kjallararúm. Men ótrúligt, hvat ið har kundi verða avrika. Áræðið og viljin til at gera tað betri vóru ómetalig.

Meg minnist, hvørja ferð sum røntgen-fólkini høvdu gjørt sítt besta í lágu og trongu kjallarahølunum við teimum gomlu og næstan hættisligu tólunum. Tá ið so myndin var klár, plagdi Pauli Dahl, yvirlækni, at bjóða sjúklinginum við inn á skrivstovuna at hyggja at.

Tað var sum at vera til fótbóltkapping: Myrku skuggarnir breiddu seg meira og meira. Felags uppgáva hjá okkum øllum var at reka skuggarnar aftur, og til tess varð einki spart frá nøkrum.

Stór var frøin, hvørju ferð tað eydnaðist. Afturgongd var meira enn einaferð; men so mentu øll seg aftur og róku fíggindan av vølli.

Henda kappingin vardi fyri mítt viðkomandi 8 mánaðir, sum í 1952, sumpart á landssjúkrahúsinum og sumpart á ríkissjúkrahúsinum.

Hesir o. u. 16 mánaðir á sjúkrahúsi mundi vera orsøk til, at eg varð valdur í sjúkrahússtýrið. Teir vísu menn á Føroya løgtingi munnu hava hildið sum so, at eg kendi sjúkrahúsið innanífrá, ið hvussu er sæð úr sjúklinga sjónarmiði, og tað er jú fyri sjúklingin sjúkrahúsið er til.

Landssjúkrahússøguna síðan 1954 ber ikki til at rekja tað stutta boð, sum eg havi fingið til at skriva hesa heilsan. Boðið er frá í dag til í morgin!

Øll síggja tey framstig, ið verið hava. Mistøk eru gjørd, og tey eru sjónsk. Men eingin skal ivast í, at øll sum hava sitið í sjúkrahússtýri og bygginevnd og tey, ið annars hava havt við byggingina at gera, hava øll gjørt sítt besta til at náa góðum úrsliti.

Hann, ið hevur upplivað onnur nýbygd sjúkrahús, veit at siga, at mistøkini her eru ikki fleiri og verri enn aðrastaðni, heldur færri og minni. Eingin uggi er í, at aðrir gera mistøk; men uggi er í, at vit ikki gera fleiri enn aðrir. Og nú, 20 ár eftir fyrstu innleggingina, kendist tað fjálgt og hugnaligt at verða fluttur heim av øðrum nýbygdum sjúkrahúsi aftur á gomlu deildina, tóat regnið dundi, so neyðugt varð at leggja løk í gluggan at tetta eisini her.

Nú gjørdist henda heilsan meira persónlig enn ætlað. Men kanska er tað nyttugt at taka ítøkilig dømi um gagn sjúkrahúsanna og manningar teirra:

Meðan nýggja landssjúkrahúsið varð bygt, vóru mong, bæði høg og lág, sum fýltust á, at so nógvar miljónir vorðu nýttar til »óproduktiv endamál,« sum tey søgdu.

Men skeivt má tað vera at kalla sjúkrahús »óproduktiv.« Ikki hevði eg verið »produktivur« í dag, vóru ikki sjúkrahús og góða manning teirra. Sama munnu mong, mong siga.

»Í Harrans hond mítt ríki stendur og ikki í Tambarboga,« segði Ólavur kongur. Og væl er tað. Men ikki skal tað undirmetast, at vit hjálpa til og hjálpa hvørjum øðrum. Eg hugsi her um bóndan, har prestur vitjaði: Bóndin var so glaður um bø sín, sum hann hevði velt upp úr óvanda mýrilendi, og sum nú var besti bøur. Hann var so fegin um hetta, at prestur helt vera neyðugt at minna á, at heiðurin átti Várharra. Jú, hetta viðgekk bóndin, »men prestur skuldi sæð, hvussu her sá út, meðan Várharra var einsamallur..«

Hetta er tann ediligi gerningur tykkara í heilsuverkinum og annars við: At hjálpa til!

Nú er fingin rættiliga góð ramma uttanum starv tykkara. Tillukku! Góðan byr og aldri víkjandi áræði og vilja til at gera tað betri!

*Jákup í Jákupsstovu.*



Grundasteinurin verður lagdur til Landssjúkrahúsið 19. juni 1962



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
vestanífrá



Sjúkrastova á B 5



Barnatysjan á B 4



Barnaburðastova



Pinkubarn í couveuse



Rannsóknarstovan



Seingjarvask



Skurðstova I



Røntgenkanningarstova við sjónvarpstóli



Reyðikrossur og Sjúkrabilurin



Landssjúkrahúsið eystanífrá



Uppvenjing í svimjihyli



Uppvenjing av sjúklingum

EINARS PRENT